FØROYA HANDILSSKÚLI




FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 317177
Telefax 313374

Heimasíða skúlans:
www.fh.fo

# Føroya Handilsskúli søkir eftir lærara

at undirvísa í systemmenning hjá teldustøðingum

**Um Teldustøðinga útbúgvingina:**
Teldustøðinga útbúgvingin er sonevnd styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2¼ ár.

Útbúgvingin fevnur í høvuðsheitum um: systemmenning, forritan, tøkni og virkið. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virkið eru ætlaði at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein og høvuðsuppgáva.

Nærri kunning um teldustøðing er á heimasíðu skúlans: www.fh.fo

**Um starvið:**
Talan er um parttíðarstarv, sum í ein ávísan mun kann lagast til møguligar aðrar uppgávur hjá tí, sum sett/-ur verður. Tey lesandi fara undir 4. lestrarhálvu í februar 2008 og hevur undirvísing í systemmenning eisini verið á útbúgvingini higartil.

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í fakøkinum systemmenning (systemudvikling)
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur innan fakøkið

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum hevur áhuga í undirvísing dugir væl at samstarva og samskifta
- tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað, men eru møguleikar fyri framhaldandi starvið.
Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn.
Lærarar á Teldustøðinga útbúgvingini verða løntir smb. avtalu.

**Starvið er leyst til setan 1. februar 2007 ella skjótast til ber.**

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn.
Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 14. januar 2008**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á telefon 317177, teldupostur: ***alk@hsh.fo.***

***Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 næmingar á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðing, HD og akademiútbúgving. Teldustøðinga útbúgvingin er skipað sum fulltíðarlestur í 2¼.***

Almanna- og Heilsumálaráðið

# Vit leita eftir løgfrøðingi til Almanna- og heilsumálaráðið

Starvið sum løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum nærum altíð skulu loysast í tøttum samstarvi við aðrar starvsfelagar í ráðnum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

Sum løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum verða tínar uppgávur eitt nú at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir, viðgera kærur frá borgarum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Almanna- og heilsumálaráðnum.

Ert tú cand. jur. ella er um at verða liðug, so vilja vit fegin frætta frá tær.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálaráðið**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**

og vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. januar 2008 kl. 12.00.

Tú ert vælkomin at venda tær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á telefon 304050 ella senda eitt teldubræv til ahr@ahr.fo. Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara www.ahr.fo, har eitt nú bygnaðurin og uppgávurnar hjá Almanna- og heilsumálaráðnum eru lýstar. Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál.

Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál, og bústaðarmál. Tað starvast í løtuni 32 fólk í ráðnum. Uppgávan hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er í høvuðsheitinum at ráðgeva landsstýrismanninum, at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur og at veita stovnum undir ráðnum ráð og vegleiðing.

**Vit draga eina línu** / **Vit seta skynsemi í hásæti**
**Vit vilja vita** / **Vit bróta slóð**



**Klagar makin um vektina?**
**So havi eg jólagávuna...**

Ring til mín, eg havi eitt sunt og effektivt "hjálpimiddel".

**Jana 51 71 00 / 31 88 19**
**lr@kallnet.fo · www.lr.fo**

FØROYA LANDSSTÝRI

Skipaeftirlitið
FAROESE MARITIME AUTHORITY
*MINISTRY OF FISHERY AND MARITIME AFFAIRS*

# Reingerðarfólk

Skipaeftirlitið søkir eftir álítandi og nærlagdum fólki, til at gera reint í skrivstovuhølum okkara, at byrja tann 1. februar 2008.

Vaskiarbeiðið er ásett til 3,5 tímar um dagin og verður lønt sambært avtalu við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu verða Skipaeftirlitinum í hendi seinast 15. januar 2008.

**Skipaeftirlitið**
Att: Jákup Poulsen
Postboks 26
FO-375 Miðvágur.

# BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo